# Undir einum lítlum træi, liggur... ein bókapakki!

*Allarbesta jólagávan er hørð og fýrakantað og keypt í bókabúðini. Sosialurin viðmælir nýggjar føroyskar bókaútgávur í hvørjum blað í jólamánaðinum.*

**Brævaskiftið millum Abelard og Heloise:**

*Kærleiki og heimspeki í heimsklassa*




Eilif Samuelsen hevur týtt søguna um sambandið millum Abelard og Heloise, sum er eitt av heimsins mest víðagitnu og tragisku kærleiksævintýrum. Hon er søgd í brøvunum hjá Pæturi Abelard, einum fronskum heimspekingi og einum av teimum størstu logikarunum í tólvtu øld, og gávuríka næmingi hansara, Heloise.

**Listin:**

*Kjak og upplýsing um list og mentan*




Kinna Poulsen og Inger Smærup Sørensen hava ritstjórnað útgávuni, Listin 2010, sum er um list og mentan. Listin inniheldur tekstir í úrvali av blogginum www.listinblog.blogspot.com, sum tær báðar skipa fyri og skriva. Listin 2010 er skipað í tríggjar partar í Myndlist, Listakjak og List, sum ikki er myndlist. Hetta er tað einasta føroyska tíðarritið, ið viðger list á rættiliga fjølbroyttan hátt í ummælum, lýsingum, umrøðum osfr.

**Til børnini:**

*Mimbo Jimbo*




Minst til at busta tenn

Søgan er um tveir lítlar fílar, Mimbo Jimbo og Mumbo Jumbo, annar er bláur, og hin er gráur og so eru teir bestu vinir. Og teir eru felags um alt, tað vil siga har tað ber til. Trupulleikar eru til fyri at verða loystir, og moralurin er: altíð at minnast til at busta tenn.



**GÓÐUR SANGUR**

*– Eg vildi fegin valt sangin »Eg sá mammu mussa jólamann«, men tá tað ikki er ein sálmur, velji eg ístaðin »Her koma Jesus tíni smá«, sigur danski undirhaldarin, Anders Lund Madsen*

**HETTA ER MÍN JÓLASANGUR**

## Anders Lund Madsen:

# Her koma Jesus tíni smá

– Eg vildi fegin valt sangin »Eg sá mammu mussa jólamann«, men tá tað ikki er ein sálmur, velji eg ístaðin »Her koma Jesus tíni smá« eftir Brorson, sigur kendi danski skemtarin Anders Lund Madsen.

Sambært Anders Lund er hann serliga fegin um 2. ørindið:

*So glað vit skunda tær ímót*
*og kyssa dustið við tín fót;*
*o, stundin sæla, náttin klár,*
*tá tú vart føddur, Drottur vár!*

– Hetta er framúr væl skrivað, heilt í nánd av sanginum »Sí, úr havi rísur nú morgunsól«.

Eg eri ikki vísur í, at eg skilji vendingina »kyssa dustið« reint praktiskt, men hugskotið er sólarklárt: Tað er at geva seg fult og heilt, sum vaskar sær, ella rættari tað at geva seg fult og heilt, sum ein vaskar sær eftir.

– Serliga hugtikin eri av teirri greiðing, sum hesin sangurin sýnir. Vantandi óttan. Fráveruna av spurningum. Eg skilji tað simpelthen ikki, men tað vekir undran og virðing, sigur Anders Lund Madsen.

(Kelda: Kristeligt Dagblad 2008)

*1. Her koma, Jesus, tíni smá*
*til tín í Betlehem at gá;*
*upplýs tú okkum sál og sinn*
*at finna vegin til tín inn!*

*2. So glað vit skunda tær ímót*
*og kyssa dustið við tín fót;*
*o, stundin sæla, náttin klár,*
*tá tú vart føddur, Drottur vár!*

*3. Vælkomin hátt frá himnasal'*
*til henda heimsins neyðardal,*
*hvar heimur tær ei annað beyð*
*enn fjós og krubbu, kross og deyð'!*

*4. Men, Jesus, hvussu ber tað til,*
*so fáur gætur geva vil*
*tí hjartans kærleika hjá tær,*
*teg dró frá himli ørmum nær!*

*5. Tú okkum smáu drag til tín,*
*o, góði sálarvinur mín,*
*at fegin hvør av okkum svá*
*í trúnni fast teg fevna má!*

*6. Lat verøld ei við síni makt*
*oss vika burt frá dópsins pakt,*
*men gev, vár longsil allur má*
*til tín, til tín í heilum stá!*

*7. Tá skulu vit víst einaferð*
*við gleðirødd í hini verð*
*við halgum í Guðs paradís*
*tær lova hátt á eingla vís.*

*8. Her standa vit í flokk' og rað*
*um teg, várt fagra hjartablað,*
*o, hjálp, at vit í himli tá*
*um trónu tína standa svá!*

Brorson 1732. Emil Joensen.